UTTAN ÚR HEIMI

## Karzai í Noregi

Afghanski forsetin, Hamid Karzai, kom sunnukvøldið til Noregs, har høvuðsørindi hansara eru at seta ein fund, sum stuðulslondini hjá Afghanistan skulu halda í Oslo. Noreg hevur formansskapin í bólkinum.

Norski menningarmálaráðharrin, Hilda Frafjord Johnson, segði í gjár, at Noreg er til reiðar at veita Afghanistan størri búskaparliga hjálp, og at talan fyri ein part verður um langtíðarætlanir. Karzai sjálvur hevur róst norsku stjórnini fyri at hava gjørt eitt gott arbeiði sum formansland í stuðulsbólkinum.

Í Oslo skal Hamid Karzai hitta Harald kong, Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra, Jan Petersen, uttanríkisráðharra og formannin í Stórtinginum, Jørgen Kosmo.

## Bretar misnøgdir

Bretsku myndugleikarnir eru misnøgdir við ta 12.000 síður drúgvu vápnafrágreiðingina, sum irakska stjórnin hevur latið ST.

Blaðið Financial Times veit at siga frá tænastumonnum í stjórnarumsitingini í London, at teir eru serliga misnøgdir við tann partin av frágreiðingini, sum snýr seg um tey kemisku og biologisku vápnini, sum Irak sigst hava. Bretar kunngjørdu herfyri sína egnu meting av teimum iraksku vápnagoymslunum, men sambært tænastumonnunum sigur innihaldið í frágreiðingini hjá stýrinum í Bagdad nakað heilt annað. Tænastumenninir siga, at Saddam Hussein fekk ein møguleika, sum hann hevur misnýtt.

Enn hava bara teir fimm føstu limirnir í ST-trygdarráðnum fingið ta iraksku frágreiðingina, og ætlanin er, at formaðurin hjá vápnaeftirlitsmonnunum, sviin Hans Blix, skal geva limalondunum eina fyribilsmeting av frágreiðingini hósdagin.

## 185 kr. um dagin

Útrokningar, sum eru gjørdar aftan á ES-toppfundin í Keypmannahavn, vísa, at tað fer at kosta ES 292 milliardir krónur tey næstu trý árini at taka tey tíggju umsøkjaralondini uppí.

Verður tað, sum tey tíggju londini skulu rinda í teir ymsu kassarnar hjá ES, mótroknað, skulu tey núverandi ES-londini rinda einar 100 milliardir krónur næstu trý árini. Tað svarar til, at verandi ES-íbúgvar skulu rinda 185 krónur í part um dagin. Samstundis fáa tey, sum búgva í umsøkjaralondunum, 880 krónur um árið frá ES.

Pólendingar og tey, sum búgva í Estlandi, Letlandi og Litava, fáa mest frá ES, meðan tey í Slovenia, Malta og Kýpros fáa minst.

## Ætlaði at selja brøvini

James Hewitt, sum var meiri enn væl við Dinau prinsessu, ætlaði at selja tey 64 brøvini, sum hann fekk frá prinsessuni.

Blaðið News Of The World skrivar, at tey á blaðnum fingu frænir av, at heryvirmaðurin ætlaði at selja brøvini, fekk hann nóg mikið fyri tey. Tíðindafólk hjá blaðnum settu seg tí í samband við James Hewitt. Tey søgdu seg umboða ein ríkmann í Sveits, sum fegin vildi keypa brøvini. Eftir at blaðfólkini høvdu boðið James Hewitt 115 milliónir krónur fyri tey 64 brøvini, tók hann av tilboðnum. Tað kom samstundis fram, at Hewitt frammanundan hevði biðið ein sakførara selja brøvini fyri seg, og at sakførarin hevði fingið eitt boð upp á 45 milliónir krónur.

Handilin varð kortini av ongum. Sakførararnir hjá búnum eftir Dianu prinsessu hava fyrr víst á, at James Hewitt í 1998 váttaði, at hann fór ongantíð at selja brøvini, sum prinsessan skrivaði honum.

# Til botns við 2862 bilum

**Norska skipið "Tricolor" sakk eftir samanstoyt í Ermasundi. Skipið var fermst við bilum frá BMW, Volvo og Saab**

SJÓFLUTNINGUR
*Árni Joensen*



*Norska farmaskipið liggur á 27 metra dýpi og kemur undan á fjøru. Umborð eru 2862 bilar*
*Mynd: Reuters*

Tað 50.000 tons stóra farmaskipið sakk góðar 15 fjórðingar úr Dunkerque leygarnáttina eftir samanstoyt við eitt bingjuskip. 22 mans vóru við norska skipinum, og teir vórðu allir bjargaðir. Bara skiparin var norðmaður. Hinir 21 vóru av Filipsoyggjunum.

Tað 190 metrar langa "Tricolor" liggur á 27 metra dýpi, og á fjøru koma umleið fimm metrar av skipinum undan. Skipið var á veg úr Zeebrúgge í Belgia til Southampton í Bretlandi við 2862 bilum av merkjunum Volvo, Saab og BMW umframt nakað av traktorum og ymsari kranaútgerð. Nakað av lastini skuldi upp í Southampton, men meginpartirin skuldi til USA.

Reiðaríið Wilhelmsen, sum eigur skipið, sigur, at lasin var tryggjað fyri millum 290 og 360 milliónir krónur, og at skipið sjálvt er tryggjað fyri smáar 300 milliónir krónur.

# Leiðararnir søgdu ja til ES, men fólkið ivast

**Meðan fjølmiðlarnir í teimum eysturevropeisku londunum yvirhøvur fegnast um komandi limaskapin í ES, er tað minni enn so givið, at fólkið fer at siga ja**

ES-VÍÐKAN
*Árni Joensen*

Næsta ár skulu veljararnir í teimum tíggju londunum, sum nú hava fingið tilsøgn um limaskap í ES, taka støðu til spurningin á fólkaatkvøðu.

Tann fyrsta fólkaatkvøðan verður í Ungarn. Hon verður tann 12. apríl, og tað er ikki av tilvild, at tað er ungarska fólkið, sum fyrst sleppur at siga sína hugsan um ES. Meiningakanningar hava víst, at nógv tann størsti parturin av ungarska fólkinum taka undir við limaskapinum, og í summum kanningum hevur undirtøkan fyri limaskapi verið heili 80 prosent.

Stjórnirnar í hinum níggju londunum vóna, at úrslitið í Ungarn fer at ávirka fólkið í hinum londunum, og tað fer fyrst at vísa seg í Pólandi, Kekkia og Slovakia, har fólkaatkvøða verður stutt eftir avgerðina í Ungarn. Í Pólandi hava kanningar víst, at 52 prosent taka undir við ES-limaskapinum, og í Slovakia siga 58 prosent ja til ES. Í hinum londunum stendur at kalla á jøvnum millum ja og nei. Minsta undirtøkan fyri limaskapinum er í Estlandi og Letlandi.

Á Malta eru nógv ímóti, at oyggin skal fara upp í ES, sjálvt um tann politiska leiðslan svaraði játtandi á toppfundinum í Keypmannahavn. Stjórnin hevur ikki gjørt av, at nær fólkaatkvøðan verður, men eitt uppskot er at halda hana longu í februar. Eygleiðarar siga, at skuldi fólkið á Malta sagt nei, fer tað neyvan at fáa stórvegis ávirkan á hugburðin í hinum umsøkjaralondunum. Í fyrra lagi er oyggin lítil, og harafturat liggur hon úti í Miðjarðarhavinum langt burturi frá teimum eysturevropeisku londunum.

# Hava forðað næstan 100 yvirgangsatsóknum

**Ovastin í amerikansku samveldisløgregluni FBI sigur, at amerikansku fregnartænasturnar hava avdúkað og forðað næstan hundrað yvirgangsatsóknum síðani 11. september í fjør**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Hóast Robert Mueller, FBI-ovasti hevur eina røð av ætlaðum yvirgangsatsóknum, sum vórðu avdúkaðar, ávarar hann samstundis um, at vandin er als ikki av.

- Tað eru framvegis fleiri yvirgangsmenn í USA, og vit fara at halda fram við bardaganum, til vit hava vissu fyri, at eingin í al-Qaeda kann gera okkum skaða longur, sigur Robert Mueller.

Sambært FBI-ovastanum eru tær ymsu fregnartænasturnar vorðnar dugnaligari at samstarva og at útgreina upplýsingar, samstundis sum fongslaðir limir í al-Qaeda hava latið myndugleikunum týðandi upplýsingar. Hetta hevur eisini havt við sær, at fleiri amerikanarar sita fongslaðir skuldsettir fyri at hava havt ætlanir um yvirgang.

Sambært Robert Mueller hava myndugleikarnir millum annað avdúkað fleiri ætlanir um at søkja at skipum ymsastaðni í heiminum, men hann vil ikki siga meiri um hesar avdúkingarnar.

FBI-ovastin er serliga fegin um, at tað eydnaðist at taka amerikanaran Abdullah al Mujahir, sum sambært amerikansku myndugleikunum hevði lagt eina ætlan um eina ógvusliga atsókn ímóti USA. FBI sigur, at ætlanin var at søkja at einum amerikanskum máli við geiðslavirknum evnum. Men álopið varð av ongum, tí ætlanin varð avdúkað. FBI sigr seg eisini hava avdúkað yvirgangsbólkar í býunum Portland, Seattle og Lackawanna.

Kortini heldur amerikanska samveldisløgreglan, at tað framvegis eru umleið 200 fólk í USA, sum kunnu roknast sum møguligir yvirgangsmenn ella stuðlar hjá yvirgangsfelagsskapum.

ítróttur

Nr. 242 • týsdagur • 17. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Danmark aftur best



*Lagið var av tí besta og allar trætur vóru lagdar til viks, tá Danmark enn einaferð staðfesti seg sum sterkasta hondbótlstjóðin í Europa við einum uppibornum finalusigri á grannunum úr Noreg*
*Mynd: Reuters*

**Hóast skolurnar móti liðnum og venjara - num hava verið mangar, so mundi alt hetta vera gloymt, tá donsku hondbóltskvinnurnar sunnudagin vunnu gullmerki í EM-kappinini**

EM-hondbóltur
*Jákup Mørk*

Við Rikke Hørlykke í einum óvæntaðum sentralum leikluti sum spælskipari fram um Kristine Andersen, og við einari - enn einaferð - stórspælandi Karin Mortensen í málinum, eydnaðist tað sunnudagin Danmark at seta seg á trúnuna sum besta hondbóltslið í Europa.

Hetta hendi í eini norðurlendskari finalu, har Noreg ikki óvæntað var mótstøðuliðið.

### Undirhaldandi finala

Talan var um ein spennandi dyst, sum svF tíbetur ehvði valt at varpa beinleiðis, heldur enn at senda forskotið, soleiðis sum tað annars hevur verið gjørt ígjøgnum kappingina. Efitr eina heldur javna byrjan, har liðini bæði royndu at finna út av taktiska upplegginum og styrkini annars hjá liðunum báðum, toktist tað gera munin, tá Rikke Hørlykke varð send á vøllin sum spælskipari fyri Kristine Andersen.

Við stórspæli og vøkrum málum var Rikke høvuðspersónurin aftan fyri donsku leiðsluna, sum eitt skifti gjørdist fýra mál, men tá Noreg hóast undirtalsstøðu fekk minkað um munin beint fyri steðgin,

Í seinna hálvleiki tóktist tað, sum um norska takið beint fyri steðgin hevði skelkað donsku genturnar nakað, og tá Noreg í løtunum eftir steðgin vann seg upp á liðina á teimum, fór av álvara at standa á.

Noreg hevur í fleiri ár havt kanska besta kvinnuliga málverjan í heiminum við Heidi Tjugum, og hon stóð eisini sum vant ein branddyst í finaluni, men ráð vóru koritni fyri hesum. Í Karin Mortensen hevur liðið fingið ein málverja í heilt avgjørdum heimsflokki, og tá mest stóð á kundi hon saman við liði sínum syrgja fyri, at talan kortini gjørdist um gull. Eftir at tað leingi hevði gingið heilt javnt fyri seg, kundi Danmark tríggjar ferðir á rað kontra seg til mál í seinna hálvleiki, soleiðis at tær tíggju minuttir fyri leiklok aftur høvdu vunnið sær eina hampuliga leiðslu.

Hesa megnaðu norsku kvinnurnar ongan tíð at taka aftur, og sum vera man, so var lagið á heimaáskoðarunum í Arenaini í Århus av tí allarbesta, tá seinasta bríkslið ljóðaði.

Gloymdar vóru allar skolurnar, sum seinastu tíðina hava verið oystar oman yvir venjaran, Jan Pytlick, og hansara úttøku. Danmark hevur aftur víst, at tær teljast ímillum avgjørt sterkastu tjóðirnar í heiminum, og við ættarliðsskiftinum, sum hevur verið framt seinastu árini er heldur einki at ivast í, at tær eisini halda sær á tindunum komandi árini.

### Tríggjar millum tær bestu

Sum vera man, so merktist danski sigurin eisini, tá fjølmiðlarnir eftir EM-kappingina skuldu gera av, hvørjir leikarar høvdu verið teir bestu.

Siður er, at eitt sonevnd all-star lið verður sett, og hesa ferð áttu danir tríggjar av teimum sjey leikarunum, sum vórðu kosnar sum tær bestu. Umframt sjálvsagda málverja sessin hjá Karin Mortensen varð Line Daugaard kosin sum besti vongurin í kappingini, meðan Kristine Andersen mundi kenna tað sum eitt stórt herðaklapp at verða kosin sum besti miðspælarin. Ikki minst eftir finaludystin, sum avgjørt ikki var hennara besti.

Hinar á stjørnuliðnum vóru Ausra Fridrikas úr Eysturríki, Stephanie Cano úr Fraklandi, Carolina Rosenberg úr Noreg og russiska Ludmila Bodnieva.

HESTPRENT



BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo